# Nýggja útgávan gjørdi sær ikki fyri skommum

*– Frammanundan roknaði eg í mínum stilla sinni við, at um tapið ikki gjørdist størri enn 3–0, so var tað væl og virðiliga at liva við. Nú iðri eg meg um, at tað ikki eydnaðist at megna javnleik*



**Tepra tapið ímóti Póllandi var heiðurligt, men eftir dystin iðraði venjarin seg um, at tað ikki hevði eydnast at fingið javnleik**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

At megna tepurt 2–1 tap ímóti Póllandi í februar í oysandi regni er ikki so galið. Tað munnu allir fótbóltshugaðir føroyingar vera samdir í. Setti landsliðsvenjarin, Jógvan Martin Olsen, heldur, at úrslitið, sum landsliðið rakk í Limasol á Kypros sunnukvøldið, er at liva við:

– Skal eg siga sum er, so hevði eg ikki bestu vónirnar, tá fleiri av royndu spælarunum góvu avboð, og tá útisetarnir heldur ikki vóru tøkir. Hugburðurin var, at nú høvdu nýggir spælarar møguleikan at vísa, hvat teir megnaðu. Spælarunum varð lagt eina við, at teir skuldu royna at spæla fótbólt og ikki at sparka. Og spælararnir eiga alt rós uppiborið fyri, at teir sparkaðu ikki, men teir royndu at spæla.

Tú sigur, at úrslitið er at liva við, men ert tú nøgdur við at tapa 2–1?

– Frammanundan roknaði eg í mínum stilla sinni við, at um tapið ikki gjørdist størri enn 3–0, so var tað væl og virðiliga at liva við. Nú iðri eg meg um, at tað ikki eydnaðist at megna javnleik. Teir vóru kanska betri fyri enn vit, men eg haldi avgjørt, at vit høvdu møguleikarnar at megna janvleik. Eydnan var ikki við okkum í avgerandi støðunum.

Men hinir høvdu eisini fleiri stórar møguleikar?

– Teir høvdu bóltin meiri enn okkara menn, men teir høvdu ikki so nógvar møguleikar. Jens Martin var óførur at taka sær av bóltunum, sum teir royndu at stinga fram ímillum. Tað tók broddin av teimum. Tá hetta ikki eydnaðist, fóru teir í 2. hálvleiki at senda langar diagonalbóltar í borðini. Hetta fór við so mikið nógvari tíð, at okkara megnaðu at skipa seg mitt fyri, áðrenn tvørbóltarnir komu. Hetta hevði við sær, at Jens Martin sera sjáldan noyddist so at siga at stórbjarga, sigur Jógvan Martin Olsen, sum fegnast um, at hansara menn dugdu at geva aftur av somu skuffu, tá mótstøðumenninir løgdu fyri við harðligum kropsligum spæli og við ælbogunum langt frá kroppinum og ofta í so ovarlaga.

Og tykkara málmøguleikar?

– Heðin á Lakjuni hevði tvær fínar royndir í 1. hálvleiki, sum høvdu betri uppiborið. Uni Arge hevði eisini fleiri góðar royndir. Hóast munurin ikki var so øgiliga stórur, so var tað týðuligt seinnapartin av 2. hálvleiki, at orkan hjá mótstøðumonnunum var eitt sindur størri, enn hon var hjá okkara monnum. Teir kroystu okkum eitt sindur. Men 2. hálvleikur endaði málleysur, og tað var serliga hugaligt, at tað síðstu minuttirnar eydnaðist okkara monnum einar tríggjar ferðir at spæla seg til stórar møguleikar, men tíverri komu vit ikki nærri, enn at Uni Arge úr spískum sendi umvegis fótin á einum og í síðunetið, og at eitt hornasparksinnlegg datt niður við handara stólpan, uttan at nakar var at beina bóltinum í málið, tíverri.

## Málini

Pólland kom á odda, tá eitt korter var farið. Uppspælið var í høgru, teir komu inn um føroysku verjuna, og flata innleggið varð úr stuttari fjarstøðu stýrt í málið, uttan at Jens Martin Knudsen hevði nakran møguleika at bjarga.

Rógvi Jacobsen javnaði til 1–1, tá 1. hálvleikur var ein knappan hálvan tíma gamalur. Heðin á Lakjuni lyfti inn um miðverjuna, og Rógvi Jacobsen tamdi og sendi framvið málverjanum, meðan pólverjarnir vildu hava dómaran at bríksla fyri rangstøðu.

Lítla løtu undan hvíldini skoraði Pólland sigursmálið úr ellivu metrum. Eftir uppspæl í vinstru og innlegg var Bartal Eliasen so óheppin, at hann feldi ein av mótstøðumonnunum í brotsteiginum, og so var kypriotiski dómarin eirindarleysur.

## Orkan betri umsitin

Seinnu árini hava yngru landsliðini spælt 4–4–2, meðan landsliðið hjá Allani Simonsen hevur hildið seg til 3–5–2 skipanina, sum var so populer, tá Sepp Piontek var venjari hjá danska landsliðnum, og Allan Simonsen tey fyrstu árini taldist millum spælararnar.

Tey seinnu árini hava tey yngru føroysku landsliðini spælt 4–4–2. Jógvan Martin Olsen hevur havt ábyrgdina av teimum. Í Ítróttarsosialinum í síðstu viku segði venjarin, at hann ætlaði at royna somu uppskriftina á a–landsliðnum, sum hann hevur brúkt á yngru liðunum:

– Tey fyrstu árini spældu vit á yngru landsliðunum 3–5–2 og við persónligum eftiransingum. Í 1999 løgdu vit um til 4–4–2. Tað gjørdu vit, tí tað ferð eftir ferð vísti seg, at okkara spælarar fóru niður við nakkanum, tí teir høvdu brúkt so nógva orku, tá teir runnu langar teinar– ikki minst miðvallararnir og miðverjarnir. Tað gekk bæði út yvir verjuspælið og álopsspælið.

Heldur tú, at tapið hevði verið størri, um gamla skipanin hevði verið nýtt?

– Tað fáa vit ongantíð at vita. Men vit kunnu staðfesta, at t. d. miðvallararnir John Petersen og Rógvi Jacobsen, runnu nógv minni, enn teir í hesum plássunum áður hava gjørt. Tað var ikki neyðugt. Miðverjarnir lógu relativt frammarlaga, so økið hjá einstaka spælaranum var ikki so ógvuliga stórt.

Heldur tú, at avrikini høvdu verið betri, tá Allan Simonsen var venjari, um liðið hevði spælt 4–4–2 í staðin fyri 3–5–2?

– Tað kunnu vit einki siga um. Allan Simonsen hevði sína fatan av, hvussu liðið skuldi skipast, og hann setti liðið saman og spælararnar upp út frá tí fatanini. Her niðri hava vit roynt at skipa okkum eitt sindur øðrvísi, og vit hava sett liðið út frá tí útgangsstøðinum.



# Heðin var rættuliga í hopla



**Nógv uppsetti vinstrabeinti vongspælarin ásannar, at hesa ferð hevði hann verið vónbrotin, um hann ikki hevði verið millum teir fyrstu ellivu**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Frammanundan sunnudegnum var hann skrásettur fyri fýra landsdystir. Bara í einum av teimum hevði hann verið millum teir fyrstu ellivu. Tað var í 1–0 tapinum ímóti Finnlandi 31. januar í fyrraárið. Tann dysturin varð spældur í La Manga í Spania, og Heðin á Lakjuni – tí tað er hann, vit tosa um – spældi 62 minuttir, áðrenn Øssur Hansen loysti hann av.

Sunnukvøldið var Heðin á Lakjuni aftur ímillum teir fyrstu ellivu. Hann var fyrstu ferð á landsliðnum í málleysa javnleikinum ímóti Andorra 3. mars í 1999. Heðin hevur stríðst fyri at fáa fast pláss á liðnum, men tað hevur gingið striltið. Meðan Allan Simonsen var venjari, var Heðin so mikið uttarlaga í hópinum, at hann ferð eftir ferð ikki fekk landsliðsboð.

Portrið fram at teimum fyrstu ellivu í EM undankappingardystunum seinni í ár er framvegis trongt. Øssur Hansen, sum hevur verið fastur maður í vinstra borði, er ikki við á Kypros, og tað er Súni Olsen, sum í fjør var fyrsti eykamaður í vinstru, heldur ikki.

– Onkra ferðina hevur tað verið tosað og skrivað um, at eg kanska fór at fáa møguleikan. Eg havi leingi kent, at eg havi verið klárur til at byrja inni, og sjálvandi hevur tað verið eitt lítið vónbrot, tá tað kortini ikki varð pláss fyri mær, men eg havi alla tíðina kent treytirnar, staðfestir Heðin á Lakjuni.

Hann ásannar, at sunnudagin hevði hann størri vónir enn nakrantíð áður um at byrja inni:

– Vit fingu liðið at vita leygardagin, og tað skal ikki vera nøkur loyna, at hesa ferð roknaði eg avgjørt við at sleppa at spæla við.

## Tvær ferðir um reppið

Enn hevur Heðin á Lakjuni ikki skorað mál á landsliðnum. Men ímóti Póllandi var hann tvær ferðir heilt tætt við:

– Aðru ferðina kom eg úr vinstru og smekkaði til við høgra beinið. Eg rakti bóltin sera væl, og hann hevði heilt víst sitið í netinum, men tíverri kom ein upp á tvørs, sum við bringuni fekk beint bóltinum burtur. Seinnu ferðina kiksaði verjuspælarin temjingina, eg fekk bóltin og kom inn í brotsteigin. Eg haldi, at eg skuldi havt skotið eitt sindur fyrri, enn eg gjørdi. Mótstøðumaðurin fekk fótin so mikið á bóltin, at hann fór skeivu megin stólpan, og so spurdist bara hornaspark burturúr, greiðir Heðin á Lakjuni frá av Kypros.

Og málið?

– Eg fekk bóltin nakað uttanfyri brotsteigin og eitt sindur til vinstru. Eg lyfti bóltin inn um miðverjarnar. Teir gjørdu ikki so nógv fyri at verja, tá Rógvi fekk bóltin. Eg rokni við, at teir hildu talan var um rangstøðu. Men linjuverjin var væl plaseraður. Rógvi tamdi bóltin. Hann var staddur eitt vet til vinstru, tá hann sendi framvið málverjanum og í handara síðunetið.

## Fyrstu ferð

Heðin á Lakjuni hevur onkra einstaka løtuna verið á liðum, sum hava verið 4–4–2 skipað. Men tað er ikki fyrrenn hesa síðstu lítlu vikuna niðri í Miðalhavinum, at hann hevur vant hesa skipanina:

– Tað hevur riggað væl. Ikki minst hjá síðuspælarunum er hetta ein hugaligur máti at spæla uppá. Í 3–5–2 ella 5–3–2 skipanunum er tað ábyrgdin hjá síðuspælarunum at koma heilt aftur á egna baklinju at verja. Sunnudagin var hetta ikki neyðugt, at tað hevði sjálvsagt við sær, at tað var meiri orka til at spæla frameftir.

Jógvan Martin Olsen heldur, at Heðin á Lakjuni royndist sera væl sum ytsti miðvallarmaðurin í vinstru:

– Avtalan var, at Jákup á Borg og Heðin á Lakjuni skuldu strúka avstað í borðunum beinanvegin, tá vit fingu bóltin. Tað vil siga, at vit lupu á við fýra monnum í fremstu røð. Tað hevði fleiri framrættaðar møguleikar fyri sendingum við sær, og tí komu okkara til málmøguleikar. Heðin á Lakjuni var sera uppsettur, hann evði nóg mimkið av sjálvsáliti at bjóða av í mann ímóti manni støðum, og hann hevði fleiri góð innlegg úr síðuni, sigur Jógvan Martin Olsen.

Eru tað aðrir spælarar, sum tú heldur stóðu seg serliga væl?

– Tað sigur seg sjálvt, at tá úrslitið ímóti einari av stóru fótbóltstjóðunum, sum fyrireika seg til HM endaspælið í summar, er so mikið gott, so er talan um eitt fínt liðavrik. Um eg skal nevna einstakar spælarar, so skulu tað – umframt Heðin á Lakjuni – vera Rógvi Jacobsen og Pól Thorsteinsson. Rógvi fall væl inn í leiklutin við síðuna av John Petersen mitt á miðvøllinum. Pól Thorsteinsson dugir væl at rokna støðurnar út. Tað er ein orduligur fongur, at hann aftur er tøkur á landsliðnum, men, sum sagt, so var talan um eitt gott liðavrik.

# Dysturin í tølum

**Póland-Føroyar 2-1 (2-1)**
Vinardystur
Sunnudagin, 10. februar 2002, kl. 21.00 á Tsirion-stadion í Limasol á Cypros
**Dómari:** Theodotou COSTAS (Cypros)
50 áskoðarar

1-0: Maciej ZURAWSKI, 12.
1-1: Rógvi JACOBSEN, 26.
2-1: Maciej ZURAWSKI, BR: 43.

**Póland**
1. Jakub WIERZCHOWSKI, Werder Bremen (12. Vojciech KOWALEWSKI, Legia Warszawa, 77.) – 2. Tomasz CIESIELSKI, Polonja Warszawa (15. Bartosz BOSACKI, Anica Wronki, 46.), 3. Jacek ZIELINSKI, liðformaður, Legia Warzawa, 4. Maciej STOLARCZYK, Pagon Szczecien (14. Tomasz KIELBOWICZ, Legia Warzawa, 63.), 5. Arkadiusz GLOWACKI, Wisla Krakow, 6. Mariusz LEWANDOWSKI, Shaktjor Bonezk (17. Pawel SIBIK, Odra Wodzislaw, 46.), 7. Pawel KACZOROWSKI; Pologna Warzawa (16. Pawel DRUMLAK, Pogon Szczecien, 46.), 8. Mariusz PIEKARSKI, Leiga Warzava (19. Grzegorz RASIAK, Graclin Dyskokolia, 46.), 9. Maciej ZURAWSKI, Wisla Krakow, 10. Tomasz KOSKALA, Graclin Dyskokolia (18. Maciej MURAWSKI, Legia Warzawa, 46.), 11. Camil KOSOWSKI; Wisla Krakow
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:**
Eingin

**gult kort:** eingin

**venjari:** Jerzy ENGEL

**Føroyar**
1. Jens Martin KNUDSEN, 53/-141, NSÍ – 4. Jóhannis JOENSEN, 10/0, HB, 5. Bartal ELIASEN, 3/0, GÍ (14. Jón Rói JACOBSEN, 3/0, HB, 76.), 3. Pól THORSTEINSSON, 22/0, NSÍ, 2. Arnbjørn DANIELSEN, 5/0, B36 – 9. Jákup á BORG, 19/0, B36 (13. Hjalrgrím ELTTØR, 1/0, KÍ, 84.), 10. John PETERSEN, 38/3, liðformaður, B36, 7. Rógvi JACOBSEN, 14/1, HB (12. Sámal JOENSEN, 23/0, GÍ, 90.), 6. Heðin á LAKJUNI, 6/0, KÍ (15. Andrew av FLØTUM, 2/0, HB, 88.) – 8. Uni Arge, 36/7, HB, 11. Christian Høgni JACOBSEN, 10/1, Vejle Boldklub
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:**
16. Meinhardt JOENSEN, 0/0, KÍ, 17. Klæmint MATRAS, 0/0, B36, 18. Palli AUGUSTINUSSEN, 0/0, VB

**Gult kort:** Rógvi JACOBSEN, 47.

**Venjari:** Jógvan Martin OLSEN
**Hjálparvenjari:** Jens Martin KNUDSEN
**Liðleiðari:** Heðin ASKHAM
**Ognarrøkil:** Birgir HANSEN
**Lækni:** Jens Pauli MARSTEIN
**Fysioterapeutar:** John-Reid SKORALÍÐ & Álvur HANSEN
**Ferðaleiðari:** Dánjal ANDREASEN



www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo